# Skeri eg teg her missi eg teg har

**Tað eru bæði fyrimunir og vansar við prísunum, sum kunngjørdir eru fyri at ferðast undir Vestmannasundi, sigur stjórin á Flogfelag Føroya**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*


*Hotel Vágar fer helst ikki at fáa tað burtur úr Vágatunlinum, sum væntandi var, sigur Uni Danielsen, stjóri á Flogfelag Føroya, sum eigur Hotel Vágar*

*Mynd.: Edvard Joensen*

**Vágar:**
Flogfelag Føroya fer at spara pening fyri vørubilarnar, sum flyta flogfrakt millum flogvøllin og Havnina. Hinvegin verður tað dýrari fyri leigubilarnar, felagið hevur. Og Hotel Vágar fer helst ikki at fá ta nyttu burtur úr undirsjóvartunlinum, sum roknað var við, sigur Uni Danielsen, stjóri á Flogfelag Føroya.

Flogfelag Føroya hevur vøruvognar, sum dagliga koyra millum flogvøllin og farmadeildina hjá Flogfelagnum í Havn.

Hesir hava goldið vøruvognstakst við Ternuni. Tað vil siga, at teir hava goldið kr, 110,- hvønn veg, sum nú ein vøruvognur av teirri stødd, teir hava, skal gjalda.

Men nú nýggja prísskipanin kemur undir Vestmannasundi, verða hesir vøruvognarnir bíligari í rakstri. Væl bíligari eisini, sigur Uni Danielsen.

Hann vísir á, at hesir vøruvognarnir eru bara umleið fimm metrar til longdar, og verða tískil bólkaðir við persónbilum, og skulu gjalda lægsta gjald undir Vestmannasundi. Tað vil siga, at teir sleppa við at gjalda 75,- krónur aftur og fram, tá fyrst er goldið fyri eitt 20 túra kort, ella Kubban, sum tað verður nevnt. Soleiðis vinnur vøruvognurin heilar 145,- krónur, ella næstan tveir túrar, undir Vestmannasundi við hesi nýggju skipanini, vísir Uni Danielsen á.

Men so er tað aftur fyri truplari við persónbilum felagsins, teimum sonevndu leiguvognunum. Har verður nógv dýrari.

Talan er um persónbilar, Flogfelagið leigar fólki, sum eitt nú kemur við flogfari og vil hava bil, meðan tey eru í Føroyum. Tey fáa so bilin handaðan á flogvøllinum og kunnu so koyra við honum móti gjaldi, meðan til tey fara avstaðaftur.

Tað ber ikki so væl til at nýta avsláttarskipanina til hesar bilarnar, sigur Uni Danielsen, tí ikki ber til at vita, hvussu ofta teir koyra gjøgnum undirsjóvartunnilin, og skipanin trekkir túrar av kubbanum. Ætlanin við slíkum leigubilum er jú, at fólk skulu gjalda fyri tað, tey koyra. So neyðugt verður helst at leggja eitt fult gjald inn í leiguna, tá bilurin veður heintaður á flogvøllinum, ella um hann skal latast aftur har.

Heldur ikki Hotel Vágar, sum Flogfelag Føroya eigur, fær tað burtur úr undirsjóvartunlinum, sum vónandi var, sigur Uni Danielsen.

At rokna við, at fólk fara at koma aðrastaðni frá vestur í Vágar at fáa sær ein sunnudagsdøgurða ella bara ein kaffimunn, fer ikki at bera til, sum støðan er nú, staðfestir stjórin á Flogfelag Føroya.

Heldur ikki aðrir møguleikar, sum eitt nú at lata fólk fara vestur í Vágar at gista, tá fult er í Havn, tykjast serliga áhugaverdir við teimum prísum, sum útlit eru fyri undir Vestmannasundi, sigur hann.

# Renna undir Vestmannasundi

**Sunnudagin fyri, at Vágatunnilin verður latin upp fyri almennari ferðslu, verður stór renni- og gongukapping gjøgnum tunnilin. Byrjað verður í Leynum, og prógv og heiðursmerki verða latin á Vágalandinum, tá liðugt er**

HÁTÍÐARHALD
*Edvard Joensen*


*Stórt tiltak verður í Vágatunlinum sunnudagin 8. december, tá tað fer at bera til at ganga ella renna gjøgnum tunnilin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sandavági:**
Fasta sambandið undir Vestmannasundi verður hátíðarhildið bæði áðrenn og aftaná, at tunnilin letur upp fyri almennari ferðslu. Eitt stórt tiltak verður sunnudagin 8. december, tá rennast ella gangast kann gjøgnum tunnilin.

Tað eru Sandavágs Ítróttarfelag, SÍF, og felagið Bragdið, sum skipa fyri hesi rennikappingini.

Luttakararnir verða býttir sundur í fleiri aldursbólkar siga fyrireikararnir. Børn undir seks ár verða í einum bólki. Síðan verða bólkarnir býttir soleiðis: sjey til níggju ár - 10 til 12 ár - 13 til 16 ár og 17ár og eldri.

Allir aldursbólkar vera bæði fyri gentur og dreingir. Tey, sum luttaka í bólkinum seks á og yngri, skulu vera í fylgi við einum vaksnum, siga fyrireikararnir. Í aðrar mátar verða eingi krøv sett teimum, sum luttaka, onnur enn tey, at tey gjøgnumføra túrin fyri at fáa luttøkuprógv.

Talan er í grundini bæði um kapping og ikki. Fólk kunnu sjálvandi renna gjøgnum tunnilin og so vóna at verða fyrst og harvið vinna eitt heiðursmerki. Men ætlanin er, at øll skulu kunna vera við, so til ber eisini at ganga gjøgnum tunnilin. Er onkur, sum situr í koyristóli, er eisini møguleiki at koma gjøgnum tunnilin við honum, um bert onkur er at koyra á. Barnavognar hava sjálvandi sama møguleika.

Sjálvt tiltakið byrjar við tunnilsmunnan Leynamegin, og runnið ella gingið verður so allan vegin gjøgnum tunnilin. Teinurin er settur til fimm kilometrar, sum er eitt lítið sindur longri enn sjálvur tunnilin.

Tá komið er á mál Vágamegin, fáa allir luttakararnir eina t-shirt við áskrift handaða sum minni um túrin. Eisini fáa vinnararnir í hvørjum aldursbólki eitt heiðursmerki.

Luttakararnir møta við tunnilsmunnarnar tí megin, tey eru stødd. Vágafólk verða so koyrd við bussi gjøgnum tunnilin til Leynar, haðani so verður farið aftur hinvegin. Tá liðugt er, verða tey, sum skulu yvir aftur á Streymoynna, eisini koyrd upp á pláss aftur, siga tey, sum skipa fyri.

Á Vágalandinum fer SÍF at selja kakao og bollar, meðan tiltakið er, eins og flogferðir eisini verða burturlutaðar millum teirra, sum luttaka í tiltakinum.

Tiltakið byrjar sunnudagin 8. december klokkan 14.00 og heldur væntandi á einar tríggjar tímar ella so, alt eftir hvussu skjótt fólk koma ígjøgnum tunnilin. Tilmelding og luttøkugjald og -treytir verða lýst nærri seinni.



# Eitt spilfrískt heilsuverk

**Hóast trupulleikar eru at dragast við í føroyska heilsuverkinum, so er heilsuverkið í nógvum førum fult á hædd við tey í grannalondunum. Tað kom fram á trivnaðar- og heilsuráðstevnuni, sum varð hildin í síðstu viku**

HEILSA OG TRIVNI
*Ingi Rasmussen*


*Viðgerðin eydnaðist, og sjúklingurin livir væl. Føroyska heilsuverkið fekk góð skotsmál á ráðstevnuni um trivnað og heilsu, sum hevur verið í Norðurlandahúsinum*

Føroyska heilsuverkið virkar yvirhøvur sera væl.

Tað vísir spurnarkanningin, sum Trivnaðar- og heilsuráðið ger av almanna- og heilsustøðuni í Føroyum.

Talan er bara um eina ávegis frágreiðing, sum varð løgd fram á eini ráðstevnu, ið var í Norðurlandahúsinum í síðstu viku.

– Sambært spurnarkanningini virkar heilsuverkið í nógvar mátar sera væl. Vit kunnu eisini staðfesta, at nøgdsemið tykist størri á teimum báðum minnu sjúkrahúsunum enn á Landssjúkrahúsinum, sigur Eyðun Christiansen, sum viðger spurnarkanningina fyri Trivnaðarráðið.

### Sparingar spilla

Hetta tykist vera eitt sindur í andsøgn við tað, vit javnan hoyra um sjúkrahúsverkið í Føroyum. Men sambært kanningini livir føroyska heilsuverkið í nógvar mátar við sítt fríska lív.

Treyðugt so eru eisini vakurleikablettir í kanningini, sum spilla glæstrimyndina eitt sindur. Onkrar deildir í heilsuverkinum vísa á sparingar, stongdar deildir og harav longri bíðilistar. Tvær deildir nevna ov lítla játtan til, at starvsfólkatalið er so høgt sum ásett, og hølisumstøðurnar eru heldur ikki nóg góðar á øllum deildum.

### Nøkur verri fyri

Ábendingar eru eisini um í kanningini, at ávísar deildir – ella ávísir sjúklingabólkar – eru verri fyri enn aðrir í føroyska sjúkrahúsverkinum.

Serliga Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum og røktardeildin hava trupulleikar at dragast við.

Partvíst er talan um ein innanhýsis trupulleika. Eitt nú áttu hølisviðurskiftini á psykiatriska deplinum at verið so fræg, at til bar at bjóða einakamar við WC til teirra, sum eru innskrivað á deplinum.

Ein annar trupulleiki liggur uttan fyri sjúkrahúsið. Stórur tørvur er á bústovnum, útslúsingarstovnum, verkstøðum og tilhaldsstøðum til teirra, sum hava verið til viðgerðar á deplinum.

### Smátt er gott

Á teimum størru sjúkrahúsunum er nøgdsemið uppaftur størri enn á Landssjúkrahúsinum, og starvsfólk hava sterkar kenslur fyri sínum arbeiðsplássi.

– Stórur dentur verður lagdur á tann týdning, sum hesi sjúkrahús hava fyri bæði trivnað og tryggleika í nærumhvørvinum í ávikavist Norðoyggjum og Suðuroynni, dregur Eyðun Christiansen saman um kanningina higartil.

Líkt er sostatt til, at tað ikki altíð er ein bági, at vit eru smá. Hetta løgdu eisini fleiri av útlendsku gestarøðarunum dent á, tá teir hildu fyrilestrar á ráðstevnuni, og sambært teimum var føroyska heilsustøðan rættiliga góð sammett við grannalondini.

### Brúkarin fær orðið

Higartil eru bara stovnar, feløg og deildir spurd um teirra hugsan um støðuna í føroyska almanna- og heilsuverkinum. Næsta stigið í kanningini er at spyrja brúkaran.

Kanningin hjá Trivnaðarráðnum skal eftir ætlan vera liðug á nýggjárinum, men tað er ivasamt, um ráðið megnar at koma við nøkrum úrsliti til ta tíð.

Bill Justinussen, landsstýrismaður við trivnaðar- og heilsumálum, segði tó í røðu síni, at hann fór at viðgera eina umsókn um at leingja tíðarfreistina við vælvild. Hann man vera glaður fyri at hoyra, at heilsuverkið ikki er so sjúkt, sum tað ofta verður gjørt til.

# Aðalráðini fáa minni ráð

**Miðfyrisitingin skal spara, eru boðini frá fíggjarnevndini hjá løgtinginum. Langt er kortini eftir á mál, áðrenn fíggjarlógin kemur aftur fyri tingið.**

FÍGGJARLÓG
*Ingi Rasmussen*

Aðalráðini í miðfyrisitingini fáa minni pengar enn tey trúðu at arbeiða við næsta ár.

Tað tykist greitt, nú fíggjarnevndin stríðist við at fáa stóru kabaluna við fíggjarlógini hjá løgtinginum fyri 2003 at ganga upp.

Onkur aðalráð hava longu fingið ábendingar um, hvussu nógv tey fáa skorið av sínari fíggjarætlan fyri næsta ár.

Óli Breckmann, formaður í fíggjarnevndini, váttar, at talan verður um skerjingar í mun til uppskotið hjá landsstýrinum.

– Játtanin verður ikki so høg sum ætlað.Vit hava prátað við aðalráðini og biðið tey verið meira moderat við sínum krøvum, men eg vil ikki kalla tað eina sparing, Tey fáa bara ikki so nógv, sum tey ætlaðu sær og halda seg hava brúk fyri, sigur Óli Breckmann.

Hann vil kortini onki siga um tøl enn, tí ov stutt er frálíðið. Hann fær heldur onki sagt um, nær nevndarviðgerðin verður liðug.

Higartil hevur fíggjarnevndin havt 12 fundir um løgtingsfíggjarlógina.

Sambært tingskipanini áliggur formanninum at gera nevndararbeiðið skjótast gjørligt, og í vanligum málum er freistin ein mánað, til álit skal latast løgtinginum. Men tá um ræður fíggjarlógina, er freistin hjá nevndini at lata løgtinginum álit tveir mánaðir eftir, at uppskotið varð beint í nevnd.

Málið var latið fíggjarnevndini 10. oktober. Sostatt skal álit latast løgtinginum 10. desember, um løgtingsformaðurin ikki leingir freistina.